| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 30. september 2010 |
| Býráðsfundur nr. | 09/2010 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2010 tann 30. september kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 24. september 2010 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Jann Toftegaard
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Sonni á Horni

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

Marin Thomsen, fíggjarleiðari luttók á fundinum, meðan mál nr. 25/2010 varð viðgjørt.

**Mál nr. 25/2010.**

***Mál viðvíkjandi 1. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlanarkarm fyri kommununa 2011.***

Fíggjarnevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 16. september 2010 til fyribils fíggjarætlanarkarm fyri kommununa fyri 2011.

Vísandi til § 39, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við gildiskomu tann 01. januar 2001, so skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið. Sambært stk. 2 í somu grein stendur, at kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan 2 ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og skal ætlanin verða endaliga samtykt í seinasta lagi 01. desember.

Skattagrundarlagið er roknað út frá upplýsningum frá Taks, har inntøkan pr. 01. september 2010 er upproknað til eitt ár. Somuleiðis er botnfrádrátturin ásettur eftir útrokningum frá Taks.
Barnatalið er 408, og barnafrádrátturin er ásettur til til kr. 4.000,00 pr. barn í 2011, sum er sama sum fyri fíggjarárið 2010.

Hjálagda uppskot, sum fíggjarnevndin hevur viðgjørt á fundum 23. og 24. september 2010 og gjørt broytingar til í mun til sjálvt uppskotið frá fyrisitingini javnvigar við kr. 57.319.373,00, og verður roknað við einum rakstraravlopi upp á kr. 373,00. Íløgurnar verða mettar til kr. 5.650.000,00 brutto og netto til kr. 5.050.000,00, rakstrarútreiðslurnar brutto til kr. 43.155.000,00 og netto til kr. 31.470.000,00, rentuútreiðslurnar + rentustuðulin til kr. 4.214.000,00 og avdráttirnir av føstum lánum til kr. 4.300.000,00.

Inntøkurnar av A+B skatti verða mettar til kr. 41.734.373,00 við einum skattaprosenti upp á 21,5%, partafelagsskatturin fyribils verður mettur til kr. 3.000.000,00 og skattur av kapitaleftirlønum til kr. 300.000,00, somuleiðis sum roknað verður við eini sølu av grundstykkjum upp á kr. 600.000,00 (sí inntøkur undir íløgum).

Fíggjarnevndin samtykt á fundi 24. september 2010 at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarkarm fyri býráðið til 1. viðgerð.

Eftir 1. viðgerð í býráðnum verður fíggjarætlanaruppskotið viðgjørt og gjøgnumarbeitt í føstu nevndunum í samráð við stovnsleiðarar og ábyrgdarfólk.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini í sambandi við 1. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlan (karmar) fyri 2011, somuleiðis sum avgerð eisini varð tikin um at beina málið aftur í fíggjarnevndini til víðari viðgerð. (9-0).

**Mál nr. 26/2010.**

**Umsókn frá P/F Marine Harvest Faroes um byggiloyvi til recirkuleringsanlegg.**
Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá P/F Marine Harvest Faroes, dagfest 07. juni 2010 um byggiloyvi til innilokan av recirkuleringsanleggi við smoltstøðina á Hellunum á matr. nr. 869b.

Vísandi til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001, so  er skriv tann 23. juli 2010 eisini sent Brunaumsjón landsins og Náttúrufriðingarnevndini fyri Eysturoyar sýslu til viðgerðar.

Kommunan hevur móttikið skriv frá Brunaumsjón landsins, dagfest 10. August 2010, har sagt verður frá, at stovnurin ongar viðmerkingar hevur til byggingina, somuleiðis sum Náttúrufriðingarnevndin við skrivi, dagfestum 17. September 2010 boðar frá, at teir geva loyvi til ætlaðu bygging.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 21. september 2010 og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi verður givið til bygging sambært fyriliggjandi tekningum.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevndini. (8-0). Meðan málið varð viðgjørt var Kristina Toftegaard Larsen ikki á fundinum vegna ógjegni.

**<u>Mál nr. 27/2010.</u>**

**Umsókn frá Thabor um byggiloyvi til umbygging av Missiónshúsinum í Fuglafirði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá bygginevndini fyri Thabor, dagfest 09. juli 2007 um byggiloyvi til umbygging og renovering av Missiónshúsinum Thabor á matr. nr. 520 á Kirkjuvegi 34 í Fuglafirði.

Vísandi til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 er hetta mál eisini sent Brunaumsjón landsins til viðgerðar. Í skriv frá brunaumsjónini, dagfest 24. Juni 2010 verður niðurstøða teirra í samband við hesa umbygging lýst.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 21. september 2010 og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi verður givið, soleiðis at ásetingarnar, sum Brunaumsjón landsins setir, verða fylgdar.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 28/2010.</u>**

**Umsókn frá Glotti um loyvi til ljóðleiðarasentral.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Glotta v/Búgva Matras Kristiansen, dagfest 24. august 2010 um byggiloyvi til ljósleiðarasentral á matr. nr. 198h, eigari Alexandur Kristiansen í Rossagerði 11 í Fuglafirði.

Støddin á bygninginum er 3x2x2,5 metrar.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 21. September 2010 og mælir nevndin býráðnum til, at loyvi verður givið til bygging sambært fyriliggjandi skitsum.

Arbeiðið verður gjørt soleiðis, at hesin bygningur ikki máar støði umdir vegnum í Rossagerði, og at bygningurin verður settur og gjørdur í samráð við teknisku deild kommununar.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 29/2010.</u>**

**Umsókn um byggiloyvi til hús til vaktarhald.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá P/F EFFO, dagfest 13. september 2010 um byggiloyvi til vaktarhús við pumpustøðina á oljubryggjuni.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini og havannevndini tann 21. september 2010 og mæla nevndirnar býráðnum til, at byggiloyvi verður givið til bygging sambært fyriliggjandi tekningum.

**Avgerð:**
Tilmælini frá teknisku nevndini og havnanevndini vórðu samtykt. (9-0).

**Mál nr. 30/2010.**

**Umsókn frá Bjarna S. Joensen um byggiloyvi til altan.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Bjarna S. Joensen, dagfest 20. september 2010 um byggiloyvi til altan til sethús síni á matr. nr. 143c á Ennivegi 71 í Fuglafirði.

Tá ið henda bygging kemur nærri marki enn 2,5 metrum, so er neyðugt við grannahoyring. Vegna eigaran av matr. nr. 148 Margrethu Hansen hevur sonur hennara Harry Hansen boðað frá, at tað er í lagi, at bygt verður ein góðan metur frá hennara grundstykki.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 21. september 2010 og mælir nevndin býráðnum til, at byggiloyvi verður givið til bygging sambært viðløgdu tekningum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 31/2010.**

**Mál um 50 metra svimjihyl á Kambsdali.**

Mentamálanevndin hevur móttikið skriv frá borgarstjíoranum, dagfest 09. september 2010 um spurningin, nú tosið um ein 50 metra svimjihyl í Føroyum kyknaði upp aftur, nú føroyingar kláraðu seg so væl í EM-kappingunum, sum hildar vórðu í Ungarn herfyri.

Serliga væl lá fyri hjá Pál Joensen úr Vági og Paula Øssurson Mohr úr Fuglafirði.

Helena Dam á Neystabø, ið talaði við móttøku á Torginum í SMS fyri heimkomnu svimjarunum, segði, at nú máttu landið, kommunur og ÍSF/SSF arbeiða fyri at fáa ein altjóða svimjihyl í Føroyum.

Hann mælir tí til, at Fuglafjarðar kommuna bjóðar seg fram til at hýsa ætlaða 50 metra svimjihylinum á økið "F" Alment frítíðarrøki á Kambsdali.

Boðað verður frá hesum skrivliga til Mentamálaráðið við tilsøgn um, at grundøki verður latið ókeypis eins og onnur almenn bygging á Kambsdali hevur fingið.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 09. September 2010 og mælir fíggjarnevndini og býráðnum til at taka undir við skrivinum frá borgarstjóranum, og hvar boðað verður Mentamálaráðnum, at kommunan gevur tilsøgn um, at eitt grundøki á almenna frítíðarøkinum verður latið ókeypis til eina tílíka verkætlan, eins og gjørt varð í sambandi við bygging av Handilskúlanum og Studentaskúlanum á Kambsdali.

Talan er um økið millum Ytru Hellá oman fyri Ítróttarhøllina inn til sethúsaøkið og niðan til sjálvt vetrarhegnið.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 23. september 2010 og mælir býráðnum til at taka undir við skrivi borgarstjórans og tilmælinum frá mentamálanevndini.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við skrivi borgarstjórans og tilmælunum frá mentamálanevndini og fíggjarnevndini í málinum. (9-0).

**Mál nr. 32/2010.**

**Mál viðvíkjandi leigu av hølunum í ovaru hædd í bygninginum hjá Fuglafjarðar sjúkrakassa.**

Í sambandi við at heilsusysturin hevur sagt seg úr starvi, so hevur sosiala nevndin á fundi tann 20. september 2010 viðgjørt spurningin um leigumálið, sum kommunan hevur í omanfyri nevnda bygningi á matr. nr. 535 á Kirkjuvegi 17 í Fuglafirði.

Eingin føst heilsusystir er í kommununi og spurningurin er, um kommunan framhaldandi skal leiga hølini í bygninginum hjá sjúkrakassanum. Tað kostar kommununi einar kr. 100.000,00 um ári til leigu, el, olju, reingerð vm. Kommunan hevur onnur hølir, sum heilsusysturin kann nýta, tá ið hon er í Fuglafirði. Kommunan hevur skyldu til at hava hølir tøk til heilsusystraskipanina.

Skúlin hevur hølir, tá ið heilsusysturin er í skúlanum, og á sosialu deildini eru eisini hølir tøk, har henda kundi havt eina skrivstovu og eitt høli til mammubólkar.

Nú sjúkrakassarnir eru farnir í søguna, er ivasamt, hvat húsið framyvir skal verða nýtt til ella um hetta verður selt.

Sosiala nevndin mælir á fundinum 20. september 2010 býráðnum til at siga leigumálið við Fuglafjarðar sjúkrakassa upp frá 01. Januar 2011 at rokna.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá sosialu nevndini. (9-0).

**Mál nr. 33/2010.**

**Broytan av upptøkureglum til dagstovn og dagrøkt í Fuglafjarðar kommunu.**

Í sambandi við upptøkureglurnar, dagfestar 15. Desember 2003, sum góðkendar eru av býráðnum fyri dagstovn og dagrøkt í kommunun i, so er ynskiligt at fáa eina grein aftrat í upptøkureglurnar, sum beinleiðis lýsa mannagongdir í sambandi við eftirstøður fyri at hava børn í ansing á dagstovni og í dagrøkt.

Tað eru fleiri og fleiri foreldur við vanligari inntøku, sum ikki gjalda fyri stovnspláss, og um foreldrini fáa at vita, at kommunan kann avgera at siga plássið upp, um foreldrini eru í eftirstøðu meira enn 3 mánaðar kundi tað hjálpt upp á inngjaldingina. Sum er, eru fleiri vanligar áminngingar sendar út, og tað sær ikki út til at ávirka foreldrini.

Leiðarin á sosialu deildini hevur gjørt uppskot til nýggja grein 10 í upptøkureglunum um eftirstøður, sum leggjast skal fyri býráðið til góðkenningar.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í sosialu nevndini tann 20. September 2010 og mælir nevndin býráðnum til at taka undir við tilmæli um nýggja grein 10 í upptøkureglunum um eftirstøður fyri barnaansing í kommununi.

Nýggja § 10 verður lýst soleiðis: "*Um eftirstøðan fyri at hava barn á dagstovni ella dagrøkt fer upp um 3 mánaðar, kann kommunan avgera at siga plássið upp, tó soleiðis at kommunan ella barnaverndarnevndini frammanundan hava viðgjørt spurningin, um heimild er at nýta fríspláss".*

Fyrisitingin hevur móttikið teldupost frá leiðaranum á sosialu deild, dagfestur 29. september 2010, hvar hon greiðir frá, at hon hevur kannað viðurskiftini í eitt nú Tórshavn, Klaksvík og Runavík, og í hesum kommunum er galdandi, at eru foreldur í eftirstøðu í 2 mánaðar, so er tað uppsagnargrund í ansingarstovnunum. Hon mælir tí til, at kommunan nýtir somu freist, sum galdandi eru í øðrum kommunum í landinum.

**Avgerð:**
Forkvinnan í sosialu nevndini heitti vegna nevndina á borgarstjóran, grundað á omanfyri standandi, um at broyta tilmæli frá 20. september 2010, soleiðis at freistin sambært § 10 fyri uppsøgn verður broytt úr 3 mánaðum niður íl 2 mánaðar.

Samtykt varð at góðkenna tilmæli frá sosialu nevndini við teirri broyting til § 10, at freistin fyri uppsøgn av ansingarpássi vegna eftirstøður verður lækkað úr 3 mánaðum til 2 mánaðar. (9-0).

**Mál nr. 34/2010.**

**Umsókn um dansiloyvi til Johns Cafe.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið teldupost frá Politinum í Føroyum – Loyvisnevndini, dagfest 31. august 2010 um ummæli av umsókn frá Sæbjørn Leiti, dagfest 30. august 2010 um dansiloyvi á Johns Cafe á matr. nr. 689 á Karvatoftum 3 í Fuglafirði.

**Avgerð:**
Samtykt varð at mæla Loyvisnevndini til, at dansiloyvi verður veitt Johns cafe v/Sæbjørn Leiti á bygninginum á matr. nr. 689 á Karvatoftum 3 í Fuglafirði, við teirri treyt, at bygningurin fær allar neyðugar góðkenningar til tílíkt virksemi frá avvarðandi myndugleikum, áðrenn møguligt loyvi verður veitt umsøkjaranum. (Brunaumsjon landsins, Heilsufrøðisligu starvsstovuni, Arbeiðseftirlitinum og løgregluni). (9-0).

**Mál nr. 35/2010.**

**Val av kommunalum arbeiðsbólki í sambandi við uppisjóvarvirki.**

Í sambandi við ætlanir um Fuglafjarðar havn sum altjóða maritimur tænastudepil, verður nú arbeitt við at stovna eitt felag, sum skal byggja uppisjóvarmatvøruvirki á havnarøkinum í Fuglafirði, og hevur býráðið gjørt leigusáttmála við Farec International um ávíst øki á havnarlagnum.

Farec International er í ferð við saman við øðrum at stovna eitt nýtt felag. Felagið undir stovnan kemur ætlandi at seta ein arbeiðsbólk, ið skal arbeiði við hesum máli.

Tá ið fyritreytirnar skulu verða gjørdar í tøttum samarbeiði við kommununa, mælir havnanevndin á fundi 24. september 2010 býráðnum til, at ein arbeiðsbólkur verður settur, ið skal ráðgeva havnanevndini/býráðnum í hesum máli.

Talan verður um ein arbeiðsbólk, sum valdur verður sambært § 36, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, og mælir nevndin til, at hesir limir verða valdir í arbeiðsbólkin:

- Sigurð S. Simonsen, borgarstjóri
- Óli Samró, ráðgevi
- Rólant Højsted, havnameistari
- Pætur Joensen, býarverkfrøðingur

**Avgerð:**
Tilmæli frá havnanevndini varð samtykt. (5-0. Blankt atkvøddu Elisabeth D. Eldevig, Kristina Toftegaard Larsen, Petur Abrahamsen og Sonni á Horni).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.50.

Dánjal Vang

Jann Tofetgaard

Elisabeth D. Eldevig

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus Midjord

Sonni á Horni

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen